einfaldari
- ger tað einfaldari

Mars 2010

# Nýggjur møtiformur í Lívdini



*Frá familjumøtinum sunnudagin 14. februar* *Mynd: Tórvør Vang*

Í sambandi við, at Lívdin er flutt í Skúlan við Løgmannabreyt, er møtiformurin sunnudagar broyttur soleiðis, at familjumøti er kl. 10.30, og kl. 11.00 er tilbiðjanarmøti við breyðbróting. Samstundis eru barnaansing og barnatiltøk.

Samfelagsløta við kaffi og køkum er kl. 11.30.

Frá kl. 12 til 13 er lovsangur og tala. Samstundis er barnaansing, sunnudagsskúli og Unglív.

lívdin
– í livd hins hægsta

Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Ikki bert gleðast um nýggju hølini

“Í somu stund fyltist Hann av gleði í Heilaga Andanum”. Hesi orðini lesa vit um Jesus í Lukas 10:21. Hví gleddist Jesus í Heilaga Andanum? Tí tað sum lá Jesusi innast á hjarta, lesa vit um í versi 20. Hann segði: “Gleðist yvir, at nøvn tykkara eru uppskrivað í Himli!” Jesus hevði størsta hjarta fyri menniskjum, og at tey skuldu verða frelst.

Tað kennist sum, stór gleði er millum fólkið í samkomuni fyri tíðina. Bøn mín er, at vit ikki bert gleðast um nýggju hølini, men meiri um tað, at menniskju verða frelst og leggjast afturat samkomuni, soleiðis at tað kann sigast um teg og meg, at vit eru fylt av gleði í Heilaga Andanum.



*Jógvan Zachariassen*

# Lívdin

## Jóna í jarðskjálvtaøki



Jóna Gunnarsson var stødd í Santiago í Chile, tá harði jarðskjálvtin rakti landið leygarmorgunum 27. februar. Hon vaknaði av ristingunum.

Tað gingu nakrir tímar, til familjan í Føroyum fekk samband við Jónu, ið hevur tað gott og biður okkum biðja fyri teimum, sum eru komin til skaða ella hava mist onkran av sínum kæru.

Jóna fór úr Føroyum 19. august í fjør. Saman við øðrum er hon send út frá trúboðanarfelagsskapinum OM (Operation Mobilisation) til Santiago, har tey m.a. arbeiða á barnaheimum, umframt at tey fáa bibliuundirvísing og undirvísing í mentan og sponskum.

Jóna kemur eftir ætlan heim aftur úr Chile í juni.

## Rannvá frá Creamy í Lívdini

Sunnudagin 21. februar sang Rannvá Joensen í Lívdini. Rannvá er kend frá sangbólkinum Creamy, har hon sang saman við donsku Rebekku Mathew fyri umleið 10 árum síðan.



*Rannvá Joensen*

Rannvá og Rebekka eru best kendar fyri sangirnar ”Æblemand” og ”Krabbesangen”.

Tær vunnu eisini eina Grammy heiðursløn í 2000.

## Ólavur nýggjur formaður



Formansskifti hevur verið í New Tribes Mission - Føroya Deild (NTM.FO). Ólavur Jøkladal hevur loyst Símin í Túni av sum formaður. Umframt Ólav Jøkladal eru Victor Nielsen í Klaksvík, Inga Simonsen í Havn og Símin í Túni á Toftum í nevndini.

## Til lukku við próvnum

Tann 4. desember 2009 fekk Sjúrður Hammer í Havn prógv sum lívfrøðingur frá University of Glasgow við heitinum Master of Research (M.Res) in Marine and Freshwater Ecology and Environmental Management. B.Sc. í Lívfrøði hevði hann frammanundan tikið á University of Aberdeen.



*Sjúrður Hammer*

---

Fríggjadagin 5. februar 2010 var hátíðarhald í høllini á Læraraskúlanum í sambandi við, at næmingar fingu prógv sum námsfrøðingar. Millum teirra vóru Rúni Eysturlíð og Sóley Samuelsen.



*Rúni Eysturlíð*



*Sóley Samuelsen*

## Til lukku við barninum

25. januar fingu Lena Nybo Hvítklett og Hjalti Hvítklett í Hoyvík ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3.475 gr.

## Flytidagur í Lívdini



Leygardagin 13. februar møttu umboð fyri øll uppsetingarliðini í Lívdini til at flyta alt tað, sum samkoman átti í Hoyvíkar Skúla niðan í Skúlan við Løgmannabreyt.

Síðan varð gjørt klárt til fyrsta møtið í nýggja skúlanum, sum var sunnudagin 14. februar.



*Jákup Jacobsen steingir í Hoyvíkar Skúla fyri seinastu ferð*

*Fólk í øllum aldri vóru við til at flyta*

## Fyrsta møtið við Løgmannabreyt

Sunnudagin 14. februar var fyrsta møtið hjá Lívdini í Skúlanum við Løgmannabreyt. Nógv fólk vóru til hetta fyrsta møtið, og fólk funnu seg skjótt til rættis í nýggju hølunum, har sera góðar umstøður eru fyri okkum øll, bæði børn, ung og vaksin.



*Myndir: Tórvør Vang*

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli   týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 2. mars: | Bønarmøti |
| 9. mars: | Bønarmøti |
| 16. mars: | Kyknubólkar (húsbólkar) |
| 23. mars: | Bønarmøti |
| 30. mars: | Bønarmøti |

## NTM ungdómsstevna í Onglandi

Frá 26. til 28. mars 2010 verður ein ungdómsstevna í North Cotes í Onglandi. Ert tú millum 16 og 25 ár, so er hetta kanska nakað fyri teg. Fá meira at vita á tel. 217505 ella á heimasíðuni: www.fo.ntm.org




## Samkomulegan á Zarepta

Samkomulegan hjá Lívdini verður á Zarepta vikuskiftið 7. - 9. mai 2010. Nærri verður lýst seinni um leguna.



## Húsreglur fyri Skúlan við Løgmannabreyt

**Samfelagsløtan**
Drekka og køkur bert á betonggólvinum.

Ikki er sitipláss til øll - latið tey, ið illa eru gongd, sleppa at seta seg.

**Børn og ung (tað, sum ikki fyrigongur í Skálanum)**
Sunnudagsskúlin er bert fyri børn.

Barnaansing er undir seinnu helvt av fyrra møtinum, og meðan seinna møtið er: Yngri børn í barnaansingarhølinum og størri børn í høllunum (bert undir fyrra møtinum).

Unglív halda til í frítíðarskúlanum.

Foreldur! Ansið eftir, at børnini ikki fara út um sperrurnar, sum eru settar fyri rampurnar.



**Ansið eftir á parkeringsøkinum**
So leingi økið ikki er asfalterað, er neyðugt at vera serliga varin við kantar og brunnar, sum stinga upp úr lendinum.

**Nýggj høli – nýggjar avbjóðingar**
Fleiri fólk á uppsetingarliðini – Tosið við Árant Jacobsen um at koma á listan. Uppsetingarmenn mugu ansa serliga væl eftir gólvinum.

Fleiri fólk á baki- og vaskiliðini – Tosið við Sunnvu Jacobsen um at koma á listan.

## Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

### Sunnudagin 7. mars
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Herklæðini (leikur v/Guttorm Joensen)*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Ert tú ein Judas?*
*Talari: Jógvan Zachariassen*
** Innsavning til nýggja bygningin*



Guttorm

### Sunnudagin 14. mars
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Avgerandi løtur í mínum lívi*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan: At vera stakur*
*Talari: Poul Guttesen*



Jógvan

### Sunnudagin 21. mars
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Rúmdin*
*Talari: Jens Wang*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan:*
*Hví eru tannáringar soleiðis?*
*Talari: Símun Absalonsen*

Jens



Poul



### Sunnudagin 28. mars
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Avgerandi løtur í mínum lívi*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Tað vakra ljóta - páskavikan*
*Talari: Jógvan Zachariassen*



Símun

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*